# Staðfesta ábyrgd av hvaladálking

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



Nú skal kannast, hvør hevur ábyrgdina av, at grindahvalir eru so illa dálkaðir, at teir ikki eru egnaðir sum mannaføði. Landsstýrið skal eisini kanna, um rættarlig krøv kunnu setast, nú eitt týðandi náttúrutilfeingi gleppur føroyingum av hondum

Sambandsflokkurin hevur sent eitt nýtt uppskot til samtyktar í Løgtingið. Vónin er, at allir flokkar taka undir við uppskotinum, ið er tvørpolitiskt.

Sambandsflokkurin skjýtur upp, at landsstýrið kannar, um tað kann staðfestast, hvør hevur ábyrgdina av, at grindahvalir í dag eru so illa dálkaðir, at hvørki tvøst ella spik, sambært landslæknanum, eru egnað sum mannaføði.

Vit halda eisini, at landsstýrið má kanna, um tað ber til at reisa rættarlig krøv móti dálkarunum. Teir eru ídnaðarlond, har kol verður nógv brúkt sum orkukelda. Kolanýtsla er ein høvuðsorsøk til, at grindahvalur er kyksilvurdálkaður.

**Kunningarátak úteftir**

Uppskotið hjá Sambandsflokkinum er byrjanin til eitt átak, har Føroyar skipað fara at kunna heimssamfelagið um dálkingina av stórum havsúgdjórum. Tað kann gerast saman við Danmark, Grønlandi og øðrum londum, ið hava áhugamál á hesum øki.

Hvalur, kópur og ísbjarnir eru eftir øllum at døma so illa dálkað djór, at skjótt er hetta tilfeingi ikki longur til taks hjá tjóðum, ið gagnnýta tað. Henda gongd má steðgast.

Í áratíggju hava útlendingar funnist at føroyingum fyri at drepa grind. Nú er skjalprógvað, at størsta hóttanin kemur uttaneftir. Tíðin er komin at venda kanónunum.

**Kolið er stóri syndarin**

Frameftir verður kol í stóran mun brúkt sum orkukelda, serliga til el-framleiðslu. Berlingske Tidende skrivar 6. jan., at umhvørvisumsitingin í USA upplýsir, at síðani 1980 er nýtslan av koli tvífaldað. Verandi nýtsla verður trífaldað innan 2030. Hetta fer, sum verða man, at dálka grindahvalin uppaftur meira.

Asia er stóri dálkarin við 2/3 av kiksilvurdálking heimsins, ið tilsamans er uml. 2000 tons av kyksilvuri árliga. Danskir granskarar eru harumframt komnir eftir, at Kina stendur aftan fyri stóran part av kyksilvurdálkingini í arktisku økjunum.

Her eru rímiliga greiðar adressur at seta á mótmæli og arbeiðið at ávirka dálkandi lond. Landsstýrið eigur saman við øðrum londum at royna at ávirka asiatisk lond, serliga Kina, til at avmarka kolanýtsluna frameftir og í staðin at brúka aðrar og reinari orkukeldur.

# Ongin yvir og ongin við síðuna av

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Nakrir journalistar halda seg vera so heilt fantastiskar, at ongin skal vága sær at seta spurnartekin við nakað sum helst viðvíkjandi teimum.

Hetta fáa vit trúttað niður í okkum av og á, og so var eisini í kvøld, nú eg lesi á Portalinum, at felagið Føroysk Miðlafólk biður fólkini í Kringvarpinum melda seg úr Starvsmannafelagnum og upp í teirra felag.

Fyri mína skyld kunnu tey gera, hvat tey vilja. Men eg síggi onki, sum bendir á, at felagið Føroysk Miðlafólk hevur evnir at røkja hesar limir betri enn Starvsmannafelagið.

»Hetta málið ella hesi málini undirstrika bert enn einaferð, at Starvsmannafelagið ikki skilir, hvussu eitt journalistiskt arbeiðspláss virkar og enn minni, hvat journalistiska fakið er – millum annað at fakið og arbeiðsøkini eru spesialiserað, soleiðis at ofta krevjast serligir førleikar til serligar uppgávur, siga Føroysk Miðlafólk, sum halda tað bert vera natúrligt, at Føroysk Miðlafólk, sum er einasta felag, ið burtur av virkar fyri journalistiska fakið, nú fer at herða strembanina eftir at fáa sáttmála fyri sínar limir í Kringvarpi Føroya. - Tí skil mæla vit eisini staðiliga okkara limum í Kringvarpinum til at tekna seg úr øðrum fakfeløgnum, sigur nevndin í Føroyskum Miðlafólkum.«

Soleiðis verður felagið endurgivið á Portalinum.

Eg má bara spyrja: Er tað so stórur munur á, hvussu eitt journalistiskt arbeiðspláss virkar í mun til onnur arbeiðspláss?

Hvat er tað fantastiska við einum journalistiskum arbeiðsplássi í mun til onnur?

- Millum annað at fakið og arbeiðsøkini eru spesialiserað, soleiðis at ofta krevjast serligir førleikar til serligar uppgávur, sigur felagið.

Harragud, tað eru flestu almennu arbeiðspláss, ið eru spesialiserað á ein ella annan hátt og við hvørt krevjast serligir førleikar at røkja eitt starv.

Men krevjast nú so nógvir serligir førleikar at røkja eitt journalistastarv?

Í útgangspunktinum kann sigast, at ein og hvør, ið hevur førleikan at skriva, kann røkja eitt tílíkt starv, ikki øll økir innan journalistikkin, men fleiri.

Og tað verður jú undirstrikað av, at rættiliga nógv fjølmiðlafólk í Føroyum ikki hava journalistaútbúgving, ja, á bløðunum eru tað helst flestu starvsfólk, ið ikki hava útbúgving sum journalistar ella myndafólk, og tað gongur fínt!

Tá 8 fólk í Kringvarpinum herfyri vórðu uppsøgd, so mótmælti Starvsmannafelagið beinanvegin. Nakað seinni føldi felagið Føroysk Miðlafólk kortini, at tey helst eisini skuldu mótmæla, men meintu tey nakað við tað?

Grundirnar fyri uppsøgnunum vóru, at Kringvarpið skuldi spara. Men hvussu nógv verður spart við hasum uppsøgnunum, sum ikki fáa virknað fyrr enn eina ferð seinna hálvár?

Samstundis søkir Kringvarpið eftir journalisti og setir starvið. Um sparing var orsøkin til uppsøgnirnar, hevði ikki verið lættari at flutt fólk, so í hvussu er ein uppsøgn minni kom upp á tal?

Veruligu grundirnar fyri uppsøgnunum í Kringvarpinum sýnast heldur at vera, at stovnurin (stjórin) vil sleppa av við nøkur ávís fólk.

Og sambært Portalinum í kvøld, so sær út til, at felagið Føroysk Miðlafólk tekur undir við hesum. Í øllum førum nýta tey somu grundgevingar sum stjórin fyri Kringvarpið fyri at rættvísgera, at samstundis sum journalistar verða sagdir úr starvi í Kringvarpinum verða aðrir settir í starv á sama stovni.

Og so vil felagið vera við, at starvsfólkini í Kringvarpinum fáa betri umstøður í hasum felagnum?

Eg meini tað!!!

# Tann neyðars Blokkur

PALLI DALSGARÐ



Havi lisið greinina hjá Hans J. Hermansen. - Greinin er bæði væl skrivað og verd at lesa, men tað er sum at tala fyri deyvum oyrum, at nevna Blokkin. Tí ein stórur partur av føroyingum hava fingið tað fatan, at bara vit fáa blokkin avtiknan, so er alt í fínasta lagi. Men tað er at undrast á, at somu fólk, ið hava verið í Danmark og skarva burtur av Blokkinum, nú gremja seg um at tey hava ov lítið av pengum at arbeiða við. Hvat hava tit tá Blokkurin er burtur? Eitt evni ið er nógv frammi er, at fáa føroyingar sum eru í Danmark heim aftur til Føroyar, alt gott um tað, men hvør skal løna teimum? Er hettar komediuspæl ella er hettar álvara? Nú næstan einans Sambandsflokk urin er eftir, ið torir at verja Blokkin. Javnaðarflokkurin byrjar so spakuliga at hella til hina síðina, er tað fyri at samla stemmur, so frykti eg fyri, at tað øvugta kann koma at henda.

Nei, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin skuldu sett í sína stevnuskrá, at fingið Blokkin aftur í tað hædd hann var og prístalsreguleraðan. Teir høvdu vunnið við tað. Tí tað er tað teir tigandi verjarnir vilja.

Tað verður so nógv skrivað og tala um Blokkin, til vit hava so nógvar aðrar fyrimunir av at hoyra til danska kongaríkið, teir fyrimunir vera ikki tiknir uppá tungu, hvørki av teim politisku flokkunum, ella av tí meiniga manninum.

# Ótakksamir sandingar!

PÁLL Á REYNATÚGVU
borgarstjóri



**Tað mundi vera fatanin hjá teimum flestu, eftir at hava lisið greinina "Sandingar komnir í neyð av gávunum", sum var borðreidd á forsíðuni í Sosialinum í farnu viku. Um hendan snaringin í yvirskriftini, hevði til endamáls at flyta ljóskastarnum frá tí veruleika, at landsstýriskvinnan, bæði virkar í andsøgn við lógina um bókasøvn, og í andsøgn við stuðulstilsøgnina frá Mentamálaráðnum sjálvum, stendur sum ein spurningur í lesarin helst má at fáa greiðu á sjálvur**

Um tað var av tilvild, ella tilætlað, at júst hettar orðasmíðið, varð nýtt í yvirskriftini, skal eg ikki gera meg til dómara yvir, men bert vísa á at eg, sum umboð fyri Sands Kommunu á ongan hátt eigi lut í tí hugburði, sum liggur aftanfyri yvirskriftina. Tvørturímóti, so havi eg saman við restini av kommunustýrinum, og sandingum annars, verið ovurfegin um tað gávumildni, sum okkara mætu synir og døtur, hava sýnt heimbygdini.

Tað sum eg yvirfyri blaðmanninum royndi at vísa á, vóru heilt aðrir trupulleikar, enn gávurnar sjálvar. Fyrst og fremst tann veruleiki, at Mentamálaráðið, sum átti at verið stóri kveikjarin mentanini at frama, í hesum føri og øðrum førum við, kanska meiri vísir seg sum haftið um beinið, í royndini at skapa karmar um mentanarlívið uttanfyri Havnina.

Her snýr tað seg um eina lítla og fíggjarliga sárbæra kommunu, sum saman við ósjálvsøknum gevarum, roynir at gera sítt til at fáa mentanarkarmarann í bygdini, og oynni við, á eitt rímiligt støði. Og hóast greiða tilsøgn, um stuðul til fíggingina fyrst í hesum árinum, so er einki hald í lyftunum frá Mentamálaráðnum. Hettar hóast Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, hava verið aktivir partar í málinum um bókasavn á Sandi. At Mentamálaráðið, ikki stendur við síni lyftir er eitt, men at tey eisini ganga ímóti greiðu ásetingum í lógini um Bókasøvn, er uppaftur verri, og kann ikki góðtakast.

Vit her suðuri, sóu heldur at Mentamálaráðið, rætti okkum bróðurhónd, í viðurkenning av at tað eru risafet borgararnir á Sandi, saman við framúr gevarum, hava tikið mentanini at frama seinastu árini.

Spildurnýggjan barnaskúla, nýtt listasavn og nú nýtt bókasavn eru varðar, sum fáar kommunur í landinum megna at fáa á føtur yvirhøvur. Vit hava verið heppin og fingið tey til veruleika eftir bert trimum árum. Mentamálaráðið átti at givið okkum eitt herðaklapp, nýtt okkum sum fyrimynd, heldur enn at sita sum ryssa yvir deyðum fili og gramt seg um alt, sum ikki ber til.

Sandingar eru sera takksamir fyri privatu gávurnar. Bert spell at virðingin hjá landsmyndugleikunum, fyri oynni sum heild, nærkast háð og spott. Almenna viðferðin av bókasvninum á Sandi, er enn eitt talandi dømi.